# SÍ tók síðsta stikkið

**MANSFLOGBÓLTUR** Hóast menninir hjá Mjølni óivað vildu havt vunnið dystin ímóti SÍ, mundu teir onkrastaðni vera takksamir fyri, at teir fingu harða mótstøðu frá sørvingum, nú FM-finalurnar ímóti ÍF standa fyri framman

Hilmar Jan Hansen

Sørvingar vistu longu fyri viku síðani, at hetta kappingarárið fór at geva bronsu, so tí høvdu teir ikki annað enn æruni at spæla fyri, tá teir í gjár vóru í Badmintonhøllini í Klaksvík og spældu ímóti monnunum hjá Mjølni, sum skulu spæla FM-finalur ímóti ÍF.

Æran vísti seg tó at vera ríkiliga góð motivatión hjá SÍ, tí dysturin endaði við einum 3-1 sigri til gestirnar, eftir at Mjølnir annars hevði lagt fyri sum eitt óløgi og vunnið stórt í fyrsta setti. Tað bleiv bara til tað hjá klaksvíkingum hesa ferð, tí trý tey næstu settini vunnu sørvingarnir.

Í fyrsta setti bar alt til hjá Mjølni, meðan SÍ hevði stórar trupulleikar hinu megin netið og eitt nú næstan ikki hevði eina líkinda móttøku. Men so skjótt sum tað var komið upp á pláss hjá SÍ, vendist ikki aftur, og restina av dystinum gekk alt við hjá sørvingum, meðan Mjølnir fekk lítið at rigga.

Mjølnir hevði enntá allar møguleikar at vinna fjórða sett, tí heimaliðið var á odda bæði 10-1 og 19-13, men megnaði allíkavæl ikki at fara allan vegin, men tapti settið og harvið eisini dystin.

Lítið man vera at ivast í, at menninir hjá Mjølni, sum fyrireika seg til FM-finalurnar ímóti ÍF, høvdu ætlað sær at vunnið dystin, men tá tað nú ikki læt seg gera, mundu teir onkrastaðni vera takksamir fyri, at teir fingu harða mótstøðu, tí tað skulu teir nokk rokna við at fáa í finalunum eisini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 21 | 18 | 3 | 57 | 21 | 36 | 25 |
| 2 | Mjølnir | 21 | 17 | 4 | 57 | 17 | 40 | 22 |
| 3 | SÍ | 21 | 16 | 5 | 52 | 28 | 24 | 21 |
| 4 | ÍF | 21 | 12 | 9 | 42 | 35 | 7 | 16 |
| 5 | TB | 21 | 9 | 12 | 35 | 45 | -10 | 11 |
| 6 | Ternan | 20 | 5 | 15 | 22 | 49 | -27 | 7 |
| 7 | KÍF | 21 | 4 | 17 | 18 | 57 | -39 | 5 |
| 8 | Dráttur | 20 | 2 | 18 | 25 | 56 | -31 | 3 |

**Mjølnir - SÍ 2-3** (23-25, 21-25, 25-22, 25-15, 12-15)
**TB - Fleyr 1-3** (21-25, 22-25, 26-24, 17-25)
**Ternan - Dráttur** (í kvøld klokkan 20)

## Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 20 | 18 | 2 | 56 | 15 | 41 | 26 |
| 2 | Mjølnir | 20 | 12 | 8 | 42 | 31 | 11 | 17 |
| 3 | SÍ | 20 | 12 | 8 | 46 | 28 | 18 | 16 |
| 4 | Fleyr | 20 | 8 | 12 | 28 | 42 | -14 | 11 |
| 5 | TB | 20 | 0 | 20 | 4 | 60 | -56 | 0 |

**Mjølnir - SÍ 1-3** (25-10, 22-25, 19-25, 21-25)




**EINKI ÓKEYPIS**

*Kvinnurnar hjá Mjølni, sum longu eru finaluklárar, fingu einki ókeypis í síðsta dystinum frá SÍ, ið stríddi seg til sigurs í Klaksvík í gjár*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

# Fleyr fekk fyrstaplássið

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Av tí at SÍ-kvinnurnar bastu Mjølni í Klaksvík, kundi Fleyr við sigri á TB í Trongisvági varðveita oddasessin, nú stigatalvan skjótt endaliga kann gerast upp

Hilmar Jan Hansen

Dystirnir í Eik-liguni hjá kvinnum í gjár høvdu í veruleikanum bara ávirkan á, hvussu endaliga støðan skuldi gerast í toppinum á stigatalvuni. Spurningurin var, um Fleyr ella Mjølnir skuldi enda ovast, tí vinnarin av landskappingini vann rættin til heimadyst í einum møguligum triðja dysti, tá FM-finalurnar verða spældar.

Fleyr var á vitjan í Trongisvági, og har eydnaðist havnarkvinnum at vinna. Og tá Fleyr undan dystinum var oddaliðið, gjørdist sigurin nóg mikið til at tryggja oddasessin og møguleikan fyri heimavølli, skuldi verið neyðugt við meira enn tveimum finaludystum.

Í dystinum ímóti TB, sum hevði Katrin Petersen við aftur eftir longri skaðasteðg, kom Fleyr klárt betur frá byrjan og tók tey bæði fyrstu settini rímiliga sannførandi. Men í triðja setti raknaði TB við og megnaði at vinna, hóast farast mátti upp um 25, áðrenn settið var komið til høldar. Hetta skakaði tó ikki Fleyr meira enn so, at í fjórða setti var yvirvágin aftur rímiliga klár, so tá TB eina ferð sá út til at koma í gongd, var tað longu ov seint.

Fleyr, sum var uttan Guðrið Syderbø hesa ferð, dugdi væl at brúka høgu spælararnar í blokkinum, so tað gjørdist meira enn trupult hjá TB at koma ordiliga ígjøgnum. Og í løtum var spælið hjá Fleyr so gott, at tað skuldi boða frá góðum undan finalunum ímóti Mjølni.

### SÍ skákaði Mjølnir

Aftaná vísti tað seg, at sjálvt um Fleyr ikki skuldi havt vunnið, hevði tað allíkavæl rokkið til fyrstaplássið, tí Mjølnir kláraði ikki sína uppgávu, tá SÍ var á vitjan í Badmintonhøllini í Klaksvík. Sostatt kundu SÍ-kvinnurnar enda árið við uppreistari pannu, hóast tær óivað eru vónbrotnar um, at tær ikki komu í finaluna.

SÍ fekk eina góða byrjan og vann tvey tey fyrstu settini. Og hóast spælið hjá SÍ ikki alla tíðina var á toppinum, var tað nóg mikið til at taka hesi bæði settini, tí Mjølnir slapp slett ikki í gongd. Men í triðja og fjórða setti komu klaksvíkskvinnur langt um leingi fyri seg, og serliga í triðja setti spældu tær væl og fingu álopini at rigga.

Sostatt mátti eitt fimta sett gera av, hvør skuldi vinna dystin, og nú var tað aftur SÍ, ið var omaná. Frá byrjan var SÍ eitt sindur frammanfyri og megnaði at halda munin, og sjálvt um Mjølnir hevði hug at nærkast ímóti endanum, vann SÍ síðsta og avgerandi bóltin í einum spennandi fimta setti, ið endaði 15-12.

Sum onkur tók til, var tað kanska Mjølnir, ið vísti meira av álopsspæli, men tað munaði bara ikki nóg mikið, tí SÍ vísti seg í verjuspælinum frá sínari allarbestu síðu og fekk øgiliga nógv uppaftur av gólvinum.

Tann allarsíðsti dysturin í landskappingini hjá kvinnunum verður spældur á Toftum í kvøld klokkan 20, tá Ternan tekur ímóti Drátti.

*hilmarjan@sosialurin.fo*